# Fyritøkan Valdemar Lützen 101 ár

**Í samband við at fyritøkan Valdemar Lützen hátíðarheldur 101 ára jubilæum í desember mánaði, bjóðar Valdemar Lützen Byggibúð allar vørður í handli sínum við 20% í avsláttri, svarandi til at vøran verður seld MVG frí**

HANDILSVIRKI
*Tíðindaskriv*

- Hetta tilboð er galdandi allan jólamánaðin. Og soleiðis kunnu fólk keypa jólagávuna frá okkum til ein skilagóðan prís, siga tey hjá Valdemar Lützen Byggibúð.

- Hetta hevur fingið fleiri kundar at doypa Skálatrøð um til »Fríhavnina«, tí at vørurnar verða seldar til ein avsláttur, ið svarar til tollfría sølu.

Hetta hevur víst seg at fingið nógv fólk at leita oman til »Fríhavnina« at gera sær dælt av góðu tilboðnum. Samstundis sum hugnaliga café'in í byggibúðini bjóðar ókeypis kaffi, kakao, cappuccino, espresso, café au lait og smákøkur. Hetta hevur verið eitt vælmótikið tiltak í hesum køldu døgum, siga tey hjá Valdemar Lützen á Skálatrøð.

Søgan um fyritøkuna Valdemar Lützen: Fabrikkin hjá Østrøm

Í 1904 stovnaði Valdemar Lützen handilsvirkið Valdemar Lützen A/S í fabrikkini hjá Østrøm, har hann seldi byggitilfar og kol. Hettar var tó byrjanin til handilsvirkið, sum broytti vøruúrvalið eftir tí tørvi, sum varð árini framyvir. Eisini keypti hann skip, sum silgdu við farmi til handilsvirkið umframt aðra frakt til Føroya úr útlondunum.

Fysta skipið, hann keypti, var »Forælders Minde« úr Danmark. Seinni varð hetta skipið selt, og Valdemar Lützen lat byggja skonnert »Sjey Systrar«, sum Andrias á Høvdanum av Strondum førdi. »Sjey Systrar« silgdu ikki bert við frakt til Føroya, men eisini við útflutningsfarmi til meðalhavslondini.

Umframt hettar skipið hevði Valdemar Lützen eisini lítla lossijakt, sum kallaðist »Diddan«. Hendan silgdi við farmi kring oyggjarnar, men var eisini nýtt sum avskipanafar í Havn, tá stór skip komu við farmi, sum ikki kundi leggja at bryggju í Havn.

## Frystivirki og sandgoymsla

Í árunum umleið 1930 víðkaði Valdemar Lützen aftur um virkið sítt við at stovna frystivirki í fabrikkini hjá Østrøm. Hetta var um tað mundið, tá fiskiførini fóru á ísfiskarí, men umframt hetta var eisini møguleiki hjá einstøkum húsarhaldum at leiga sær goymslurúm til matvørur. Tá ísfiskiskapurin í árunum 1948-49 legði um til saltfiskaframleiðslu, var frystvirkið niðurlagt.

Í somu tíðini sum frystivirkið var í Rættará, keypti Valdemar Lützen ein sandbát saman við Niels í Heiðunum. Niels førdi sjálvur sandbátin »Slúkur«, sum skipaði sandin upp á goymslu í Rættará, hiðani sandurin var seldur til húsabygging og annað, sum varð bygt í teirri tíðini.

»Slúkur« var undir seinna heimsbardaga seldur til Íslands. Í árunum 1925-47 seldi Valdemar Lützen eisini olju og petrolium fyri Esso, men tá hettar felagið í 1947 gjørdi nýskipan í Føroyum soleiðis, at Esso fekk beinleiðis sølu her, gavst hann við hesum.

Valdemar Lützen leigaði stór skip úr útlondum, sum komu við byggitilfari og kolalast nakrar ferðir um árið. Tá var fraktprísurin so lágur, at Valdemar seldi øll skipini og innflutti vørur í hesum stóru skipunum ístaðin.

Avskipanin av koli varð skipað upp í stórar kurvar og síðani koyrt í trillibørum á goymslu. Hetta kravdi nógv arbeiðsfólk, einar 15 mans.

## Byrjaði ísenkramhandil

Í 1952 hendi aftur enn einaferð nýskipan innan handilsvirkið. Tað var Anni Lützen sum gjørdi lítlan búnýtisdeild á Bryggjubakka. Tá Valdemar Lützen (y) í 1953 kom aftur eftir lokna útbúgving, keypti virkið kædnahandilin hjá Heinesen í Vágsbotni. Har bleiv opnaður ein amboðshandil, ið Valdemar Lützen yngri varð leiðari á. Fyrst í 60-unum víðkaði Valdemar Lützen (y), so at báðar hæddirnar í Vagsbotni, blivu tiknar í nýtslu. Amboðshandil á fystu hædd og búnýti á aðru hædd.

Soleiðis var gongdin í handilshúsinum í Vágsbotni fram til miðskeiðis í 1980-unum, tá ið avgjørt varð at flyta amboðshandilin út á Skálatrøð, soleiðis at amboð og byggitilfar varð samlað á sama stað í nýggja byggimarknaðinum á Skálatrøð.

Valdemar Lützen er stjóri í handilsvirkinum P/F Valdemar Lützen og framtíðarvánirnar eru sera bjartar tey næstu 100 árini. Fjórða ættarliðið er nú byrjað at taka yvir.

## Fóru úr skúla og arbeiddu til pensjónsaldur

Nógv av teimum starvsfólkunum sum hava verið hjá P/F Valdemar Lützen, hava havt arbeiði har alla sína tíð, til tey løgdu frá sær vegna aldur. Soleiðis starvaðust Ebbe Ki (Jacobsen) á skrivstovuni í 50 ár, eins og Olga Mikkelsen eisini var ein av teimum, sum arbeiðddu alt sítt vaksna lív í virkinum.

Dia á Lava, Ferdinand Rubeksen, Jógvan Mikkelsen, Jákup Michael, og Addaba arbeiddu allir meira enn fimmti ár hjá P/F Valdemar Lützen.

Eisini synir hjá arbeiðsfólkunum tóku starv hjá hesum virki. Soleiðis hevur Johan á Lava nú arbeitt í 50 ár hjá Valdemar Lützen. Eins og Mogens Lützen eldri, ið var stjóri á virkinum í góð 50 ár.

Núverandi stjórin Valdemar Lützen (y) hevði 50 ára starvsdag í september 2003, nevnast kann eisini at Hans Petur Joensen hevur starvast í 37 ár í handilsvirkinum.


miðlahúsið í Vágsbotni




**Frá nú av og til jóla verða Sudoku uppgávur at finna hvønn dag í Sosialinum.**

**Jú fleiri uppgávur, ið tú hevur loyst, tess størri møguleika hevur tú at vinna.**

**Sendið okkum loysnirnar innan 29. desember og viðmerkið brævbjálvan "Sudoku".**

**Vinningurin er ein Samsung E730 + eitt Teletíðarhald frá Føroya Tele. Virði 3.295 kr.**

**Henda fartelefonin hevur so at siga alt sum skal til í eini fartelefon. Megapixel-kamera, video, MP3, Bluetooth, FM-radio, 96 Mb minni v. m. Eisini hevur E730 ein TFT-skerm við 262.000 litum.**

**Drigið verður millum jól og nýggjár**

# SUDOKU KAPPING

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6 | | | 8 | | | 2 | | 7 |
| | | 8 | | | | 6 | 1 | |
| 1 | 5 | 4 | | 7 | | | 9 | |
| 9 | | | | 2 | 1 | | | 5 |
| | 4 | | 9 | | 6 | | 7 | |
| 2 | | | 3 | 4 | | | | 8 |
| | 1 | | | 5 | | 7 | 3 | 6 |
| | 6 | 2 | | | | 4 | | |
| 8 | | 7 | | | 9 | | | 1 |

V. EASY # 11

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 8 | 7 | | | | 1 | | | |
| | | | 8 | | | | | |
| 4 | | 3 | | | 2 | 8 | | |
| | 2 | | 3 | | | | 4 | 7 |
| 7 | | | | | | | | 9 |
| 6 | 1 | | | | 9 | | 2 | |
| | | 9 | 4 | | | 5 | | 8 |
| | | | | | 5 | | | |
| | | | 1 | | | | 3 | 4 |

MEDIUM # 11

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | 3 | 6 | | 5 | 7 | | |
| | 6 | | | | | | 2 | |
| 2 | | | 1 | | 9 | | | 8 |
| 8 | 5 | | | 1 | | | 6 | 4 |
| | | 2 | | | | 1 | | |
| 9 | 1 | | | 8 | | | 7 | 3 |
| 7 | | | 3 | | 2 | | | 6 |
| | 9 | | | | | | 3 | |
| | | 1 | 8 | | 6 | 5 | | |

EASY # 11

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 5 | 1 | | | | 4 | 8 | 6 |
| | 8 | | 6 | | | | | |
| | 7 | | | | | | | 1 |
| | | | | 7 | | | 4 | 5 |
| | | | 9 | | 2 | | | |
| 2 | 4 | | | 5 | | | | |
| 5 | | | | | | | 9 | |
| | | | | | 7 | | 6 | |
| 4 | 9 | 6 | | | | 3 | 5 | |

HARD # 11

NAVN: ____________________ BÚSTAÐUR: ____________________

Sendið til: Sosialurin · Box 76 · 110 Tórshavn. Merkið brævbjálvan "Sudoku"

Sosialurin
Tórsgøta 1 · P.O. Boks 76 · FO-110 Tórshavn · Tel 34 18 00
Fax 34 18 01 · post@sosialurin.fo · www. sosialurin.fo